Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jacob Vestergaard, løgtingsmaður

Svarari: Aksel V. Johannesen, løgmaður

Evni: Sandoyartunnilin

Spurningar:

1. Er ósemja ímillum P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil og arbeiðstakaran NCC um at gera Sandoyartunnilin lidnan?
2. Drálar NCC við at gera Sandoyartunnilin lidnan, og um so er, hvør er orsøkin?
3. Sleppa undirarbeiðstakarar ikki fram at, fyrrenn NCC er liðugt við sítt arbeiði?

Viðmerkingar:
Tað hoyrist millum manna, at ósemja ímillum tunnilsfelagið og NCC ger, at NCC drálar við at gera Sandoyartunnilin lidnan, samstundis sum undirarbeiðstakarar ikki sleppa framat, fyrrenn NCC er liðugt við sítt arbeiði.

Arbeiðið hevur gingið skjótari enn tíðarætlanin, og skal ósemja vera um møguligt «bonus» til NCC, um NCC letur tunnilin áðrenn ásettu tíðina.

Spurningarnir verða settir til løgmann fyri at fáa váttað ella avsannað tíðindini.

Tað kann virka skilaleyst, um ein ósemja ger, at tunnilin ikki verður gjørdur liðugur og tikin í nýtslu skjótast til ber.

Um so er, verða sandoyingar, ja allir føroyingar, hildnir sum gíslar.

Tað má vera vinningur fyri allar partar, at tunnilin verður gjørdur liðugur sum skjótast.

Á Løgtingi, 9. mai 2023

Jacob Vestergaard